# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hugaligt og harmuligt

Eftirrákin frá stóra vikuskiftistiltakinum í Klaksvík livir framvegis. Enn eina ferð varð staðfest, hvussu imponerandi stórsligið tað ber til hjá føroyingum at fáa burturúr, tá ið lógvatøk verða tikin, og lokala samfelagið við øllum sínum netverkum lyftir í felag.

Hetta sást vikuskiftið fyri Ólavsøku, tá ið gøtufólk stóðu saman um teirra festival, hetta sást, nú klaksvíkingar stóðu saman um teirra tiltak, og hetta fer ivaleyst at síggjast aftur, tá ið gospel festivalurin í Skálafirði verður um stokkuta tíð.

Tað er ikki altíð rætt, at saman at standa var ei okkum givið, sum tað á sinni varð yrkt. Aftur og aftur eru vit eygnavitni til, hvussu framúr nógv tað ber til at fáa burturúr. Sjómannadagurin í Klaksvík, sum verður á skránni um nakrar dagar, er enn eitt dømi um hetta. Og hetta vikuskiftið verður Ovastevna í Nólsoy saman við regatta.

Harmuligt var tað, at størsta ódnin í summar skuldi velja sær leygardagin, tá ið klaksvíkingar bjóðaðu Føroya fólki og øllum øðrum at seta krúnuna á væl eydnaða festivalin, at gera seg inn á Føroyar og føroyingar. Tað kundi ikki verið meiri óheppið. Serliga tá ið hugsað verður um, hvussu veðrið hevur roynst fyrr í summar og eisini síðani leygardagin.

Tá ið tað stóð nógv á, og illveðrið gjørdi seg inn á og hevði hug at gera av við pallar og básar, var tað hugaligt at síggja samanhaldið, tá ið tað er alneyðugt at lyfta í felag fyri at verja, byrgja upp fyri og bjarga. Eftir einari lítlari løtu var stórt lið av dugnaligum fólki savnað, og so gekk tað sum eftir ánni at taka niður, pakka saman og at fáa til høldar.

Hugaligt var tað eisini at kenna føroyska lyndið aftur. Í staðin fyri knarr og grenj um rættindi og krøv um endurgjald, so hoyrdist meiri til tey, sum harmaðust um, at veðrið skuldi hava verið so ólagaligt ímóti óføra tiltakinum.

Nú er aftur gerandisdagur, og tað er framvegis nógv hugaligt at fegnast um í føroyska sumrinum, sum vit kunnu rokna okkum at eiga ein mánað eftir av. At fylgja skiftandi veðrinum er fantastiskt. Leygardagin var lágættin so døpur og harðlig sum ongantíð hesa ársins tíðina. Og í gjárkvøldið var veðrið so fínt og litspælið so fagurt, sum tað sjáldan sæst.

Tað er hugaligt at búgva í hesum landinum, men tað var harmuligt, at veðrið skuldi arga so illa leygardagin, tá ið tað kortini var hugaligt at síggja, hvussu væl føroyingar duga at standa saman, tá ið tað stendur mest á!

**Sosialurin**

# Frels okkum frá okkum sjálvum

**Vit eiga at fáa eitt val nú og gera upp við seráhugamálini í føroyskum politikki. Hetta til tess at røkka málinum um eitt frælst og ábyrgdarfult samfelag, har øll hava sama rætt og virði. Í løtuni eru vit í ferð við at endurtaka blundruringina í Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne**

**HØGNI HOYDAL**



"Vit hava nú roynt við blomstrum,
grundgivið, so bókasøvnini bólgna av viti,
vit hava smílst og heilsast,
lógvarnir gapa húðaleysir."

...yrkir Jóanes Nielsen um politisku og sosialu støðuna í Føroyum.

Og hann hevur rætt. Tað eru ikki grundgevingar. Tað eru ikki royndir. Ikki tos. Ikki royndir at smíla pent og heilsa. Ella fyrireikingar okkum vantar í Føroyum til tess at skapa einar størri, rúmligari og samhaldsfastar Føroyar. Einar Føroyar, har vit kunnu liva við frælsi, sjálvsvirðing og sterkum samleika millum heimsins fjølbroyttu fólk. Og har hvør einstakur hevur somu rættindir og skyldur til at virka og liva og velja – uttan mun til hvussu vit eru fødd inn í henda heim og hvussu lívsleið okkara hevur lagt seg. Har ongin einstaklingur ella serstøk stætt hevur framíhjárætt til vald landsins og ognir.

Tað okkum vantar er hinvegin ábyrgd, atgerð og avleiðingar. Ábyrgd, atgerð og avleiðingar, ið mugu – og bara kunnu – grundast á hugsjónir, virðir og mál. So at samsvar er ímillum virðini og gerðir okkara.

Og her hevur okkara politiska skipan svikið ferð eftir ferð. Meðan aðrir partar av samfelagnum hava ment seg og vaksið við ábyrgdini, hevur politiska skipan okkara støðugt latið seráhugamál, sjálvsøkni og ávísar bólkar mynda avgerðirnar, tá á stendur. Og harvið hevur politiska skipanin altíð máað burturav ábyrgdini, rættartrygdini og felagsskapinum – við djúptøknum avleiðingunum fyri alla tjóðina.

**Studningsniðurskurður forðað skrædli**

Vit eiga at fegnast um, at tað í undanfarna valskeiði eydnaðist et gera okkum leys av meir enn triðinginum av árliga gjaldinum fyri okkara egna sjálvræði og ábyrgd – og at fastfrysta hetta gjald.

Harafturat eydnaðist at støðga teimum uppskotum, ið vórðu løgd fram, um aftur at geva studning til fiskivinnuna.

Annars høvdu í dag 1,3 milliardir komið árliga úr danska ríkiskassanum inn í okkara búskap í dag – studningsmyllan til útvaldar vinnur hevði malið aftur – og vit høvdu longu verið farin út av eggini aftur.

Tey árini var samstundis peningur lagdur til viks og skuld niðurgoldin

Tey allarflestu duga at síggja í dag, at hetta er beinleiðis orsøkin til, at føroyski búskapurin kláraði at standa ímóti einum so stórum sveiggi, at alivinnan fór á heysin, rækjuflotin fór nærum allur, fiskaprísir minkaðu og oljuprísurin fór upp – alt í einum.

Vit kunnu siga við vissu, at tað einasta, ið hevur forðað fyri, at vit í hesum valskeiðnum hava endurtikið allan tann ábyrgdarleysa politikkin, ið elvdi til kreppuna í áttatiárunum, er at studningurin til vinnuna varð støðgaður og ríkisveitingin skorin og fastfryst.

**Aftur á gamlar gøtur**

Tað finnast neyvan dømir um politiskar og búskaparligar skipanir í vesturheiminum, ið hava verið fyri so djúpum kreppum við so órættvísum avleiðingum fyri tey veikastu, sum føroyska heimastýrisskipanin hevur verið karmur um.

So royndirnar hava vit beiskar. Tá skrædlini hava verið, hevur í eitt tíðarskeið kanska eydnast at læra av royndunum og gera onkrar broytingar. Kortini hevur søgan endurtikið seg, tá ein tíð er frálíðin. Tær somu politisku kreftirnar, ið umboða seráhugamálini, hava traðkað somu gøtur – og hava altíð megnað at lagt ábyrgdina aðrastaðni. Ja, enntá hevur oftast eydnast at gykla fólki fyri, at tey somu, sum havt størstu ábyrgdina av trupulleikunum, eisini skulu loysa trupulleikarnar, tey sjálvi hava skapt.

Heitið á hesum fyribrigdi og hesum politikki, kundu vit hóskandi rópt: "Frels okkum frá okkum sjálvum".

Hetta er støðan í Føroyum í løtuni. Teir trupulleikar og tey mál, sum eru mest átroðkandi at loysa, hevur politiska skipanin sjálv skapt ella gjørt truplari í hesum samgonguskeiðnum.

Og tað stendur øllum greitt, at núverandi samgonga sjálvsagt ikki megnar at frelsa seg frá sær sjálvari. Og hon er ikki før fyri, at taka fremstu avbjóðingarnar upp fyri føroyska samfelagið. Hon er fastløst í einum politiskum talvi, har einstakir menn á borðinum kunnu skáka hinar í øllum málum, so at støðan verður ævigt remis.

**Høvuðsmálini parkerað**

Eg skal bert nevna nøkur av málunum, ið eru mest avgerandi fyri framtíð Føroya:

Okkara viðurskifti við umheimin, har vit hava bundið okkum føst í danska løggávu, ið ger okkum til "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne" og har øll nú duga at síggja, at hetta er ein spennitroyggja.. Vit hava onga atgongd til heimin sum føroyingar og sum Føroyar, og rena okkum í múrar allastaðni í altjóða samfelagnum. (Eisini embætisfólk landsstýrisins siga tað nú beinleiðis, at ríkisrættarliga støðan er størsta forðingin fyri at menna okkum úti í heimi.)

Búskapar- og fíggjarpolitikkurin, har allar lampur blunka reytt sambært landsstýrismanninum sjálvum. Fyrst og fremst orsakað av einum óumhugsaðum skatta- og avgjaldspolitikki og ongum langtíðarætlanum, ið kunnu gera búskapin óheftan. Vit hava í dag ein søguligan møguleika at sleppa okkum heilt av við blokkstuðulin og leggja upp fyri skiftum í búskapinum. Men vit reka fíggjarpolitikk sum "business as usual", har vit spæla gávumildir veitarar til ymsar samfelagsbólkar:

*Framhald á síðu 13*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.